## 1. Yvirskipað

Hetta fylgiskjal greiðir frá mannagongdini, sum verður fylgd, fyri at eyðmerkja fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og góðsku.

Gjaldstovan velur eitt vinnandi tilboð og harvið ein veitara út frá einari meting av teimum innkomnu tilboðunum. Gjaldstovan fremur bert eftirmeting í tráð við ásettu tillutanartreyt fyri tilboð, sum lúka form- og minstukrøv.

## 2. Tillutanar- og undirtillutanartreytir

Sáttmálin verður tillutaður sambært ásettu tillutanartreyt, sum er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og góðsku.

Gjaldstovan brúkar fylgjandi undirtillutanartreytir:

- Prísur 80 %
- Góðska 20 %

Prosenttølini omanfyri umboða vektina á teimum báðum undirtillutanartreytunum í samband við metingina av tilboðunum. Undirtillutanartreytirnar eru lýstar meira nágreiniliga niðanfyri.

## 3. Karakterstigi

Innkomin tilboð fáa karakter eftir fylgjandi karakterstiga:

| Karakterur | Týdningur |
|---|---|
| 5 | **Avbera gott**<br>Verður givið tilboðum við eginleikum ella góðsku, sum betra um loysnina, ella á annan hátt hava við sær sera stóra virðisøking / sera góður prísur. |
| 4 | **Gott**<br>Verður givið tilboðum við eginleikum ella góðsku, sum betra um loysnina ella á annan hátt hava við sær góða virðisøking / góður prísur. |
| 3 | **Rímiligt – sum væntað**<br>Verður givið tilboðum, sum lúka tørvin ella eru við til at loysa uppgávuna / Prísurin er hvørki góður ella ivingarsamur. |

| | |
|---|---|
| 2 | **Heldur ófullfíggjað**<br>Verður givið tilboðum, sum hava ávísar manglar í mun til at lúka tørvin. Uppgávan kann loysast við ávísum stríði / heldur ivingarsamur prísur. |
| 1 | **Ófullfíggjað**<br>Verður givið tilboðum, sum hava manglar í mun til at lúka tørvin. Uppgávan kann loysast, men til eitt støði, sum akkurát kann góðtakast / ivingarsamur prísur. |

Lýsingin av omanfyrinevndu karakterum skal bert síggjast sum yvirskipaðar ábendingar. Tað er sostatt bert ábendingar, sum skulu lýsa spennið í stiganum. Karakterurin verður givin sum desimaltal, um metingin fellur í millum tvey karakterir.

## 4. Meting av undirtillutanartreytunum

### 4.1 Prísur

#### 4.1.1 Hvussu prísurin verður útroknaður

Gjaldstovan roknar út eina kostnaðarmeting fyri hvørt tilboð. Henda kostnaðarmeting verður roknað út við at falda hvønn eindarprís í *Fylgiskjal C – Prísskjal* við ásettu mongdini til prísmeting fyri hvørja vøru. Úrslitini fyri hvørja vøru verða samantald, og samlaða talið umboðar kostnaðarmetingina fyri tilboðið.

**Legg til merkis, at mongdin, sum er ásett yvir av hvørjum eindarprísi í "Fylgiskjal C – Prísskjal", bert skal síggjast sum ein skikkað meting av, hvussu nógv útbjóðari væntar at keypa í tí tíðarskeiði, sum sáttmálin er galdandi. Talið er tískil ikki bindandi fyri útbjóðara.*

**Legg til merkis, at hald hjá stovnum uttanfyri Landsnet ikki verður ein partur av eftirmetingini.*

**Legg til merkis, at vinnuligt breiðband ikki verður ein partur av eftirmetingini.*

**Legg til merkis, at sjónet ikki verður ein partur av eftirmetingini.*

#### 4.1.2 Karakterur fyri kostnaðarmeting

Øll tilboð, sum lúka form- og minstukrøv fáa ein karakter á einum karakterstiga frá 1 – 5.

Tilboðið við lægstu kostnaðarmeting fær karakterin 5. Øll onnur tilboð verða sett á ein linjurættan karakterstiga. Tilboð við einari kostnaðarmeting, sum eru 15 % ella meira omanfyri lægstu kostnaðarmeting, fáa karakterin 1 (sum víst í ritmynd niðanfyri).




### 4.2 Góðska

Góðska verður mett út frá í hvønn mun góðskukrøvini í *Fylgiskjal A* verða gingin á møtið. Góðskukrøvini í *Fylgiskjal A* eru:

| Fylgiskjal – Nr. | Kravfesting | Meting |
|---|---|---|
| Fylgiskjal A – 25 | **Sjálvgreiðsla**<br><br>Yvirlitið yvir hald eigur at vísa fylgjandi funkur:<br>- Kontu<br>- Nummar<br>- Ferð<br>- Slag av haldi<br>- Bústað<br>- Kostnað | **1 stig** verður givið, um kravið, harundir øll parametur, ikki eru uppfylt.<br><br>**5 stig** verða givin um kravið, harundir øll parametur, eru uppfylt. |

| | | |
|---|---|---|
| Fylgiskjal A – 26 | **Sjálvgreiðsla**<br><br>Sjálvgreiðslan eigur at hava fylgjandi funkur:<br>- Bíleggja<br>- Broyta ferð<br>- Feilfráboðan<br>- Stovnan av undirkontum | **1 stig** verður givið um kravið, harundir øll parametur, ikki eru uppfylt.<br><br>**5 stig** verða givin um kravið, harundir øll parametur, eru uppfylt. |
| Fylgiskjal A – 38 | **Váttan um skoðan**<br><br>Veitarin eigur uttan eyka kostnað at veita eina váttan um generellu KT trygdina frá uttanhýsis KT grannskoðara. | **1 stig** verður givið, um kravið ikki kann uppfyllast, t.e. um váttan um generellu KT trygdina frá uttanhýsis KT grannskoðara ikki verður latin inn saman við tilboðnum.<br><br>**5 stig** verða givin, um kravið kann uppfyllast, t.e. um váttan um generellu KT trygdina frá uttanhýsis KT granskoðara verður latin inn saman við tilboðnum. |

Øll góðskukrøv fáa stig, og tann samlaði karakterurin fyri vøruna verður roknaður sum miðaltal av stigunum.

## 5. Samla meting

Tá ið tilboðið er mett sambært undirtillutanartreytunum, verður ein samlað meting av tilboðnum framd, sum er grundað á karakterirnar, sum eru givnir fyri undirtillutanartreytirnar og vektina av teimum.

Sáttmálin verður tillutaður til tilboðið, ið hevur fingið hægsta samlaða karakterin.